# Mugu stuðla hvørjum øðrum

**- Tað kann ikki vera rætt, at vit sum samfelag eru so veik, at vit mugu eksportera børnini, sigur Evy. Hon og Selma hava havt stóra gleði av hvørjari aðrari**

BØRN OG UNG
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fyri Evy hevur tað verið torført at vera opin um trupulleikarnar hjá dóttrini, og hon sigur, at hetta er eitt eyðkenni hjá flestu familjum, sum hava børn við slíkum ósjónligum sjúkueyðkennum sum ADHD.

Øll hugsa, »tað er bara eg«, men tað passar jú ikki, og eingin orkar at bera slíkt einsamallur, staðfestir hon. Tey seinastu árini hava hon og Selma stuðla hvørja aðra, tá ið illa hevur staðið til.

- Eg kann ringja til Evy, tá eg ikki orki meir, og hon skilur meg altíð, og vit kunna práta og biðja saman, sigur Selma. Onnur hava hinvegin ofta torført við at skilja, hvussu gerandisdagurin hjá slíkum børnum er, tí brekið er ósjónligt.

Evy heldur, at tørvur er á einum felagið fyri foreldur at børnum við ADHD, og hon vónar, at henda blaðviðgerð kann vera eitt fyrsta stig til hetta. Selma er samd.

- Tað eru nógv foreldur, sum ikki orka at berjast, og tað kann ikki vera rætt, at børn ikki verða hjálpt, fyrr enn foreldrini eru um at drukna og sjálvi mugu berja seg fram til eina bjarging.

Menningin innan viðgerð og stuðul til børn við ADHD hevur verið stór í londunum rundan um okkum seinastu árini, og tí er tað ónøktandi, at Føroyar slett ikki fylgja við, siga tær báðar.

- Sjálvt grundleggjandi vitan manglar her heima. Foreldur, pedagogar, lærarar, ja sjálvt politikarar høvdu havt gott av at fingið meira at vita um hesi børnini og hvønn tørv tey hava.

Tær kenna báðar til fleiri familjur, sum eru fluttar av landinum, tí børnini ikki fáa hjálp her, og lívið tí verður ótolandi fyri alla familjuna.

- Tað kann ikki vera rætt, at vit sum samfelag eru so veik, at vit mugu eksportera okkara børn, sigur Evy avgjørd.



*- Menningin innan viðgerð og stuðul til børn við ADHD hevur verið stór í londunum rundan um okkum seinastu árini. Tí er tað ónøktandi at Føroyar slett ikki fylgja við, siga Evy og Selma, sum báðar stríðast fyri at geva børnum sínum neyðuga hjálpina*

## Hví skulu vit sendast av landinum?

**Tá ið dóttir Evy hoyrdi, at sonur Selmu var sloppin inn á danskan skúla, setti hon seg niður og skrivaði hetta:**

Eg eri ein 12 ára gomul genta við ADHD. Eg haldi tað er ringt at liva í Føroyum og hava ADHD og onga hjálp fáa. Eg hevði ynskt, at tað hevði verið nógv meira hjálp at fáa í Føroyum, bæði í skúlum, heima og á stovnum.

Eg varð send til Danmarkar, og tað er ikki serliga stuttligt at verða sendur til Danmarkar frá familju og vinum. Nú havi eg fingið hjálp, men eru tað ikki nógv fleiri børn í Føroyum, sum hava ADHD og onga hjálp fáa í Føroyum, men vera send niður til Danmarkar ella bara skulu liva sum onnur børn, sum ikki hava ADHD?

Tit skulu bara vita, at tað eru ræðuligt at hava ADHD og skula ganga í skúla ella á onkrum stovni við nógvum øðrum børnum, tí sjúkan ger at man verður troyttur og eisini ill/ur. Eingin ynskir at vera heima allan dagin, tí mann ikki orkar at vera saman við fólki. Hví skulu vit við ADHD siga ja til at verða send av landinum? Hví kann tað ikki koma hjálp til Føroya?

Eg havi tað gott nú og kann fara út at spæla ella til onkran vin at vitja, tí eg eri á einum stovni á Argjum og læri at liva við mínum breki, men tað er ikki altíð lætt at góðtaka tað. Onkuntíð, tá ið eg og familjan skulu hugna okkum við onkrum, kann tað gott vera at okkurt lítið problem kemur í millum, so haldi eg altíð, at tað er mín feilur, tí eg eri so býtt, eg eri ónd og sovorðið tvætl, sum kemur inn í mítt høvd. Eg kann eisini lætt blíva ill, tá alt ikki gongur eftir mínum høvdi. Tí er brúk fyri einum stovni í Føroyum.

# Fleiri umsóknir um føroyskan eftirskúla

**Olavus Jespersen, deildarleiðari fyri fólkaskúladeildina í Mentamálaráðnum, sigur, at tríggjar ítøkiligar umsóknir um at byggja eftirskúla fyri børn við ADHD og/ella øðrum trupulleikum liggja í ráðnum**

BØRN OG UNG
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*



*Mentamálaráðið hevur fleiri umsøknir um nýggjar serskúlar til børn við t.d. ADHD, og Olavus Jespersen, deildarleiðari, væntar, at viðgerðin skjótt verður liðug*



*- Almannaverkið brúkar nógvar pengar at senda børn av landinum. Hesir pengar høvdu rokkið langt, um teir vórðu brúktir til ein føroyskan stovn, heldur Hans Eli Dahl, leiðari á Sernámsdeplinum*

Í samband við valið varð politiska viðgerðin av umsóknunum um eftirskúlar útsett, men Olavus Jespersen væntar, at viðgerðin fer í gongd aftur, nú nýggjur mentamálaráðharri er sett-ur.

Í dag er Skúlin á Trøðni einasta veruliga skúlatilboðið út yvir fólkaskúlan. Men hann er óegnaður til børn við tillagingartrupulleikum, tí hann er ætlaður til børn við størri trupulleikum.

Deildarleiðarin á Sernámsdeplinum, Hans Eli Dahl, váttar, at børn við tillagingartrupulleikum ikki fáa nóg góð tilboð í dag. Hetta kunnu vera børn við ADHD, men eisini børn sum eru kensluliga órógvað av øðrum orsøkum.

- Hetta er ein spurningur um pengar. Vit hava skikkað starvsfólk, so tað er ikki ein spurningur um starvsfólkamangul, sigur Hans Eli Dahl.

Men samstundis sum talan er um pengar, so snýr tað seg líka so nógv um raðfesting, ella sum Hans Eli Dahl orðar tað:

- Almannaverkið brúkar nógvar pengar at senda børn av landinum. Hesir pengar høvdu rokkið langt, um teir vórðu brúktir til ein føroyskan stovn.